"Deutchland" í Føroyum:

# Professionell móttøka í Runavík

*Stásliga ferðmannaskipið "Deutchland" fekk eina sera væl fyreikaða móttøku, tá tað legði at í Runavík týsdagin*



**Móttøkan, stóra týska ferðamannaskipið "Deutchland", fekk í Runavík gjár var óvanliga væl fyriskipað. Kommunan bjóðaði millum annað manngini á ein ókeypis busstúr við ferðaleiðara, og sjálvt handlarnir vóru klárir at taka ímóti evru gjaldoyra**

FERÐAMANNASKIP
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Týsmorgunin legði "Deutchland", sum er stórsta og stásiligasta ferðamannaskipið í Týsklandi, at bryggju í Runavík. Við vóru út við 500 týsk ferðafólk, umframt manningina. Umboðsmaðurin hjá "Deutchland", Jóhan Mortensen sigur, at tað var ein stór fragd at verða við til sera væl fyrireikaðu móttøkuna, mynduleikarnir í Runavík góvu stóra skipinum og gestunum.

### Væl fyrireikað

Mynduleikarnir í Runavík høvdu rættiliga spílað seg út at taka ímóti skipi og ferðafólkum, tá "Deutchland" legði at bryggju týsmorgunin. Havnarskrivstovan var væl fyrireikað, og fólk frá Kunningarstovuni stóðu klár at kunna um landið og økið og svara spurningum. Ferðafólkini, ið høvdu hug at fara til handils, rendu seg heldur ikki í trupulleikar, tí kommunan hevði boða handlunum frá, so teir kundu gera seg klárar at taka ímóti evrum.

- Eg var satt at siga sera ovfarin av, hvussu høgum støði móttøkan var á uppá allar mátar. Blíðskapurin var óførur, og alt riggaði, sum tað skuldi niður í minsta smálut. Eitt av ferðafólkunum hevði til dømis brúk fyri læknahjálp, tá skipið legið at, at tað gekk bert ein lítil løta, so stóð sjúkrabilurin klárur á keiuni, greiðir Jóhan frá.

Seinni á degnum skipaði Runavíkar Kommuna fyri ókeypis bussferð fyri allari manningini umborð á skipinum. Við Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, sum ferðaleiðara, gekk leiðin millum annað ein túr til Æðuvíkar, har gestirnir fingu turran fisk og eina góða føroyska øl.

Áðrenn skipið fór avstaðaftur, var borgarstjórin Rodmundur Nielsen umborð á skipinum, har hann handaði skiparanum eina modellslupp sum gávu til "Deutchland"

### Ferðamannaskipini flokkast til Føroyar

"Deutchland" hevur verið í Føroyum fleiri ferðir fyrr, men hetta var fyrstu ferð skipið legði at í Runavík. Jóhan Mortensen hevur umboðað skip av hesum slag í fleiri ár, og ivast ikki í at Runavík framyvir ferð at verða ein týðandi kappingarneyti hjá Havnini at taka ímóti slíkum skipum.

- Runavíkar havn er ómetaliga væl egnað til at taka ímóti so stórum skipum. Her er sera frítt fyri allastaðni, gott pláss og kyrrupláss mest sum alt árið. Sera nógv áhugaverd ferðavinnumál eru eisini í økinum, so tað er neyvan nakar ivi um, at Runavík fer at verða alsamt meir brúkt til at taka ímóti stóru ferðamannaskipunum, metir Jóhan, og leggur afturat, at fleiri skip longu hava biðið um atløguplass í Runavík í summar.

Og nógv bendir eisini á, at Føroyar eru vorðnar eitt sera vælumtókt ferðavinnumál hjá stóru ferðamannaskipunum. Sigurd Simonsen á Hoyviking Tours er ein av teimum, sum skipar fyri útferðum við gestum av stóru ferðmannaskipunum. Sigurd hevur júst gjørt tvær útferðir við gestum av "Deutchland" og hevur bíleggingar at gera útferðir við gestum av ikki færri enn 29 skipum afturat í summar.









Seismiskar kanningar á landgrunninum:

# Oljurisin Chevron setir spónin í

KANNINGAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eitt av heimsins størstu oljufeløgum ChevronTexaco fer nú av álvara at seta spónin í føroysku undirgrundina, fyri fyrstu ferð nakrantíð. Risastóra amerikanska oljufelagið søkti um leitiloyvi í 2. útbjóðing og varð tillutað teigar beint við markið saman við feløgunum Statoil, Dong og OMV. Hesir teigarnir liggja tætt upp at einum øki á bretska landgrunninum, har somu feløg hava gjørt stórt oljufund. Sjóbjargingarstøðin MRCC lýsir í hesum døgum við eini fráboðan um seismiskt virksemi hjá Chevron. Tað er felagið Western Geco, sum kannar økið fyri oljufelagið. Byrjað verður 15. juli og er ætlanin at skjóta seismikk í tveir mánaðir. Skipið, sum verður brúkt til kanningarnar, er Western Pride.

Seismisku kanningarnar verða gjørdar á hesari havleið:

1. Útnyrðingshornið
63º20' N 000º24' W
2. Landnyrðingshornið
Eystur ímóti markinum frá pos 1.
3. Landsynningshornið
Eystur ímóti markinum frá pos 4.
4. Útsynningshornið
60º40' N 005º00' W

Sum vanligt er eisini føroyskt fiskiveiðiumboð við seismikkskipinum. Tað er Magni Skaale, sum skal fylgja við, at alt fer fram eftir bókini.



*Ætlanin er at skjóta seismikk báðumegin markið í hesum loyvum: F008 á føroyskum øki og P1025, P1165, P1191, P1193, P1194 og P1196 á bretskum øki. Brian Smith, stjóri hjá Chevron sigur, at við at brúka ein nýggjan kanningarhátt verða teir betur førir fyri at síggja, hvat er undir basaltinum*

Sera nógv seismiskt virksemi er á landgrunninum í summar. Frammanundan hevur Statoil brúkt tvey kanningarskip, og tað triðja fer undir kanningar um miðjan juli.

Seismisku kanningarúrslitini hjá eitt nú hesum báðum feløgunum skulu vera partur av grundarlagnum hjá feløgunum, tá tey fara at gera av, nær og hvar tey skulu seta framtíðar borar í á landgrunninum. Statoil og Chevron eru millum tey mest ágrýtnu og bjartskygnu feløgini, tá tað ræður um at leita eftir kolvetni í føroysku undirgrundini.